# Ótrúligur føroyskur mentanararvur undir hamaran

**Túsundvís av brøvum og skjølum av ómetandi virði fyri føroyska gransking og føroysk-danska mentanararvin eru funnin. Øll henda forkunnuga skjalagoymslan fer undir hamarin í november mánaði, skrivaði danska blaðið BT**

SKJØL
*Snorri Brend*

Ein av teimum týdningarmestu og verandi skjalagoymslan til at lýsa føroysku mál- og mentunarsøguna er nú komin undan kavi, eftir at hava verið løgd til viks í Føroyum.

Talan er um tað sonevnda "Evensen-Arkivet", sum umfatar fleiri túsund upprunaliga brøv og skjøl frá føroyska málgranskaranum og prestinum A.C. Evensen.

Øll hesi skjølini fara undir hamarin hjá Bruun Rasmussen Kunstauktioner í Keypmannahavn seinast í november mánað.

- Vit fingu eitt tips um málið fyri einum hálvum ári síðni, og hava síðani brúkt tíðina at kanna tað, áðrenn vit nú hava almannakunngjørt skjalagoymsluna, sigur Sebastian Hauge Lerche, sum er kommunikatiónsstjóri hjá Bruun Rasmussen.

Skjalagoymslan hevur avgerandi týdning fyri føroyska – og eisini danska – mentanararvin, og hevur haraftrat ómetaligt virði fyri føroyska gransking.

- Vit hava soleiðis – varliga – mett virðið á skjalagoymsluni til eina fjórðings millión, sigur Sebastian Hauge Lerche.

---

Landsbókavørðurin:

# - Skjølini hava søguligt virði

**Seinast í november fara ein hópur av søguligum føroyskum skjølum undir hamarin á danskari auktión. Martin Næs, landsbókavørður kennir ikki júst hesi skjølini, men viðgongur at tað ljóðar sum um hesi skjølini hava eitt stórt søguligt virði**



*Martin Næs, landsbókavørður metir at skjølini hava søguligt virði*

*(savnsmynd)*

SKJØL
*Snorri Brend*

Martin Næs segði sunnudagin – sama dag sum tíðindini komu fram - at hann er vitandi um eina samling av skjølum hjá AC Evensen. Men um talan er um somu skjøl, sum nú fara á auktión veit hann av góðum grundum ikki.

Hinvegin so finst ein lóg – tann sonevnda Bókasavnslógin – har ein hevur tryggjað seg ímóti, at mentanargripir verða fluttir soleiðis av landinum.

Martin vísir til grein 4 í lógini, har greitt er orðað um handrit, sum ikki mugu flytast av landinum.

Í hesum førinum er kortini eitt sindur óvist úr hvørjum tíðarskeiði, hesi skjølini eru.

AC Evensen (1874 – 1917) virkaði tað mesta av síni tíð í Føroyum, og tí kunnu hetta vera skjøl frá hesi tíðini. Hinvegin so sigur lógin greitt, at tað er ikki loyvt at taka skjøl og flyta tey í annað land, uttan við loyvi frá landsstýrismanninum í mentamálum.

- Men sjálvandi – her kann jú saktans vera talan um eitt heilt annað savn.

Men í øllum førum sær hetta út til at vera eitt virðismikið savn, sigur landsbókavørðurin.

## FAKTA

**Bókasavnslógin**
Í grein 4 í Bókasavnslógini verur soleiðis tikið til: "Bøkur, handrit og onnur verk, ið eru privat ella almenn ogn, eldri enn 100 ár, eru at meta sum mentanargripir og mega ikki flytast úr landinum uttan við serligum loyvi frá landsstýrismanninum í mentamálum".

## Jógvan: Ráðføri meg við onnur

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í Mentamálum, segði við útvarpið sunnudagin, at hann fekk boð fyri nøkrum døgum síðani um at skjølini hjá Evensen fóru at verða seld. Hann fer nú at seta seg í samband við Landsskjalasavnið og kanska onnur við, fyri at ráðføra seg og síðani taka støðu til, hvat ið tað almenna fer at gera.

**sb.**

Landsskjalavørðurin:

# - Kanna hvørji skjølini eru

**Sámal T. F. Johansen, landsskjalavørður hevur ikki sæð skjølini, sum fara á auktión um góðar tveir mánaðir**

SKJØL
*Snorri Brend*

Landsskjalavørðurin sigur - í generellari - viðmerking, at er talan um privat skjøl so er tað ein privat ogn. Men er talan um almenn skjøl, so eru tey at rokna sum almenn ogn.

Er talan veruliga um almenn skjøl, so skulu tey latast Landsskjalasavninum ella øðrum stovni í varðveitslu.

Í slíkum førum er tað altíð ein meting, um slík skjøl hava serligt virði fyri okkum føroyingar. Ber kortini ikki til at fáa tey í varðveitslu, so er ein annar møguleiki at fáa ljóstak av skjølunum.

Sjálvur hoyrdi Sámal um hesi skjølini fríggjadagin, tá umboð fyri Bruun Rasmussen (teir sum skipa fyri auktiónini) sendi honum ein teldupost, har greitt varð frá hesi ætlanini.

- Vit eru tí í løtuni í ferð við at kanna, hvat er í øllum hesum málinum.

- Vit fara eisini at seta okkum í samband við miðfyrisitingina um, hvat gerast kann um ein partur av mentanararvi okkara soleiðis fara aðrastaðir, sigur hann í stuttari viðmerking.


HVÍTVØRUR

damor



**Beko vaskimaskina**
- 1400 snúðningar
- Vaskievni A
- Tekur 5,5 kg.

Fyrr 4998,-

nú 3.998,-



**Beko uppvaskimaskina**
- AAA maskina
- Larmar lítið
- Elektronisk stýring

Fyrr 5598,-

nú 3.998,-



**Beko køliskáp**
- 144x54 cm
- Lágorka
- Glashillar

2.998,-



**Indesit komfýrur**
- Superlágorka (A)
- 8 programmir
- Keramikplátur
- 56 litrar ovnrúm
- Hitaluft

Fyrr 5998,-

nú 4.598,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor